# Nýggj bók
## um leikaramenning

Fótbóltssamband Føroya gevur í hesum døgum út nýggja frálærubók í leikaramenning. Bókin fæst í bókabúðum, á Shell-støðum og hjá FK í vikuni.

Rithøvundar eru Jógvan Martin Olsen og Johan Nielsen, sum báðir hava drúgvar royndir innan venjing og leikaramenning.

**Bókin verður løgd fram í Miðlahúsinum mikudagin, 13. desember 2006 kl. 16.30.**




**Fótbóltssamband Føroya**

www.fsf.fo





# ECB hækkaði rentuna í 3,50%

MARKNAÐARRÁK

Hósdagin í farnu viku hevði evropiski miðbankin, ECB, rentufund. Stutta rentan varð hækkað úr 3,25% til 3,50%. Hetta var sættu ferð síðan desember í fjør, at rentan varð hækkað við 0,25%-stigum. Íleggjarar høvdu væntað hetta, og tað var tí tíðindafundurin, sum var mest áhugaverdur. Har varð sum vant sitið undir hvørjum orði frá stjóranum, Trichet, og hann vandaði sær sum vant eisini um orðini. Til dømis varð tað mett sum týdningarmikið, at Trichet ikki beinleiðis segði, at rentan fer at hækka meir. Hinvegin varð eisini stórur dentur lagdur á, at Trichet segði, at miðbankin fer at fylgja sera væl við gongdini í prísvøkstrinum. Sum heild tulkaði marknaðurin hetta, sum at miðbankin fer at hækka rentuna aftur í 1. ársfjórðingi av 2007. Hetta fekk lánsbrævarentur at hækka eitt sindur, og partabrøv endaðu dagin óbroytt.

### Lánsbrævarentur støðugar

Rentuhækkingin frá ECB varð væntað av marknaðinum, og var tí longu innroknað í lánsbrævarenturnar. 10-ára rentan flutti seg lítið í farnu viku. Hon er nú 3,74%, og 1-árs rentan er 4,07%.

### Bíða eftir tíðindum frá D/S Torm

Fyri tveimum viku síðan kungjørdi størsti partaeigarin í fragtreiðarínum D/S Torm, Beltest, at tey tær komandi tvær vikurnar fóru at leita eftir møguligum keyparum av Torm. Mánadagin var farið um evstamark og tí verður spennandi at hoyra frá teimum um, hvussu gongst við málinum. Um eingin tíðindi skjótt verða borin fram, kann kursurin væntast at lækka nakað aftur, hóast kursurin er lækkaður 10% frá stóru hækkingini uppá 30% næstseinastu viku, tá tíðindini fyrst frættust.

### Hesa vikuna

Tað verður ikki jólafriður á marknaðunum enn. Hesa vikuna verður dentur lagdur á rentufundin hjá amerikanska tjóðbankanum, og prísvøksturin haðani. Eisini verður dollarin framhaldandi í andgletti.

### Donsk 10-ára renta




### Vísital fyri norrøn partabrøv




### Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 563,20 | 0,8% | ↑ |
| JPY | 4,81 | -0,7% | ↓ |
| GBP | 1.102,54 | -0,4% | ↓ |
| NOK | 91,62 | 1,6% | ↑ |
| SEK | 82,22 | -0,4% | ↓ |

### Virðisbrøv

| Norrøn | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 98,64 | -0,1% | ↓ |
| Norrøn Partabrøv | 121,73 | 3,4% | ↑ |
| **VMF** | **Kursur** | **+/- %** | |
| Atlantic Petroleum | 551,00 | 0,4% | ↑ |
| KB Trygg Eurostoxx | 107,11 | 0,8% | ↑ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*

*Vika 50*